SOSIALURIN

Nr. 64 — 4. SEPTEMBER 1963 — 36. ÁRG.

Í DAG

STJÓRNARMÁL FØROYA

Støða gamla sjálvstýrisflokksins

TAKA vit støðu sjálvstýrisflokksins í stjórnarviðurskiftum Føroya við danska ríkið, so er har beinanvegin **at siga**, at heimastýrislógin á øllum økjum er víðgongdari, enn stevnuskrá flokksins nakrantíð hevur verið frammanundan nýggju stjórnarskipanini.

FLOKKURIN hevði í síni tíð meiraluta á tingi, men tá hendi einki stjórnarliga, og kann hetta ivaleyst setast í samband við sjálvstýristilboð Stauning's fyrst í tretivinum; men hóast hetta tilboð kom einki burtur úr nøkrum, tí tað vísti seg, at flokkurin veruliga ikki kundi sømjast um nakað uppskot; menn høvdu víst talað um sjálvstýri, men hvussu nógv skuldi leggjast í hetta rakstrarorðið, høvdu teir ikki gjørt sær greitt.

TINGMENN flokksins vóru við til at samtykkja og arbeiða undir fyribils skipanini, sum gjørd varð undir kríggnum, og hóast flokkurin einki uppskot hevði, tók hann lut í samráðingunum um og var við til at samtykkja heimastýrislógina, sum flokkurin tó nú er til reiðar at gera til einkis.

*

»Sjálvstýrislandsstýrið« og sjóverjan

TAÐ var ikki hissini teir galdraðu á sinni, tá seinasta landsstýri leigaði »VIÐOYNNA« til vaktarskip. Dagblaðið og 14. sept. vóru á tremur við brigsli av versta slag — og sjálvandi gloymdu teir ikki at minna á, at hetta var svikagerð og eitt prógv fyri, at P. M. Dam ikki vildi hava nakað nýtt vaktarskip.

MEN P. M. Dam og hansara landsstýri høvdu lagt alt til rættis at útvega okkum nýtt vaktar- og bjargingarskip, sum skuldi sigla 16 míl. Peningamálið var greitt og Skála skipasmiðja skuldi byggja hetta nútímans far.

SO KOM nýtt landsstýri við m. a. Erlendi Paturssyni sum fiskimálaráharra — hesum knassinum, sum vildi hava stórt skip, nýtt skip — og við stórum kanónum.

TAÐ fyrsta teir gjørdu var at sabotera málið. Einki nýtt skip skuldi byggjast. Erlendur legði til brots fyri at keypa ein avgamlan, upplagdan, dýran norskan hvalabát; men illsemja kom í í landsstýrinum, so hetta fall niður fyri; men so fingu teir endaliga loyst málið: »VÍKINGUR« hjá Kjartan Mohr gjørdist vaktarskip — 9 míls ferð og onga STERKA KANÓN.

SOSIALURIN Viðmerkingar

SJÓVERJAN.

NAKAÐ dundu andstøðuflokkarnir á seinasta landsstýri um at fáa verjuskip til vega. Fólkaflokkurin, sum í 8 ára stjórnartíð síni ikki hevði gjørt nakað til muns at loysa hetta mál, byrjaði beinanvegin við skuldsetingum og ósonnum illgitingum mótí landsstýrinum, sum hann var leysur úr stjórnarsitarvinum.

Tjóðveldismenn hava roynt at gjørt almikið burtur úr hesum máli, og hava sjálvandi ikki verið aftari við sínum illgitingum enn fólkaflokkurin.

UNDIR seinasta landsstýri var alt lagt til rættis fyri at útvega brennýtt vaktarskip. Peningurin var fingin til vega, og Skála skipasmiðja hevur átikið sær byggingina.

So langt var komið undir seinasta landsstýri.

Hvat hevur hetta landsstýrið gjørt. Stutt sagt einki. Talan var einaferð um at keypa Keflavík — eina gamla slupp, og rætt er tað, at landsstýrið bjóðaði av øðrum manni og fekk Keflavík

Annars hevur verið talað um ein gamlan norskan hvalabát, sum tó fólkaflokksmenn og tjóðveldismenn komu at klandrast um.

OG so endaði tað við »VÍKINGI«!

Undir seinasta landsstýrið rópti Erlendur: stórt, nýtt og skjóttgangandi verjuskip við — STERKUM KANÓNUM.

Brøv til Sosialin

PRÍSLAGIÐ.

Tað verður ofta tosað um, hvussu dýrar vørurnar eru. Hetta er eitt, men tað, sum er enn lagnari eru teir ójøvnu prísirnir á somu vørum.

Tað er ikki langt síðan, eg keypti ein lut her sunnanfjørðs. Eg gav 21 kr. fyri hann, og hugsaði bara at dýrt var; men ikki gjørdist við, tí stórar prishækkingar vóru farnar fram eisini á øðrum vørum.

Komin til Havnar kagaði eg eftir sama luti har og rakti við, at her var prísurin 18,50 kr., men meira undraði tað meg, tá eg øðrum handlí kundi fáa henda lut fyri ikki meira enn 16,75 kr.

Her var sostatt ein munur uppá 1,75 kr. í sama býi og munurin millum hægst og lægsta prís heilar 4,25 kr.

Jú, sanniliga trýtur okkum eitt strangt príseftirlit.

Suðuroyingur.

Skrivað verður um

»60 MILJÓNA GRUNNIN« í hesum døgum — og tað í øllum bløðum. Sum kunnugt var tað P. M. Dam, fyrrv. løgmaður, sum undir samráðingum við donsku ríkisstjórnina um nýggjan íløgupening, fekk tilsøgn um henda pening — 60 milj. kr. Javnaðarmenn vórðu háðaðir og speiriknir, tá teir undan seinasta vali nevndu um henda grunn — og tað av øllum teimum flokkum, sum nú sita í tí sokallaða »sjálvstýrislandsstýrinum.«

Sjálvt hin tápuligasti veljari kundi trúgva, at júst hesir somu menn nakrantíð fóru at geva seg í hóslag við hesar táturmiljónirnar hjá javnaðarmonnum; men tó so, í dag er tað veruleiki, at teir hava biðið um tær, og at tær nú eru stóra álit sjálvstýrislandstýrisins.

Lat okkum hoyra, hvat t. d. »14. sept. skrívar um hesar miljónirnar undan seinasta vali:

»SOSIALURIN heldur fram at gabba av teimum 60 miljónunum í 10 ár, ið Danmørkia vil læna Føroyum. Jú, hetta er nakað at gabba av, aftaná at tað er vorðið upplýst og so kemur ein av grovu vallygnum tjóðveldismanna), **at hetta er ein partur av teimum miljónunum, Danmark fær fyri herstøðirnar í Føroyum. Sigið Sosialurin Føroya fólki, hvussu nógv Danmark fær fyri radarstøðirnar á Samfelli og loranstøðina á Eiði?«**

UM so er at nakar tjóðveldismaður trýr, at Danmark fær so almikið fyri hesar støðir, ja, so er tað herpeningur — blóðpeningur, atompeningur — og tílíkum peningi kunnu tjóðveldismenn ikki taka ímóti. Teir, sum vildu hava hervaldið av landinum, radarstøðina niðurtikna o.s.fr. Nei, slíkt kunnu ærligir politikkarar ikki gera!

Men vit hava fullgóð prógv fyri, at ærligir eru tjóðveldismenn í øllum førum ikki!

Bluffmakarar, sum við svindurskriving hava roynt at villleitt Føroya fólk.

Landbúnaðurin

Neytahotel í Týsklandi

»KÜH-TEL« — kúgva-hotel — eru nú vórðin veruleiki í Rhindalinum í Týsklandi. Hitt fyrsta er tikið í brúk og kann rúma 1500 kúm. Fólk, ið hava heldur tepra tíð, kunnu seinna mjólkineytini hagar, har tey verða ansaði og mjólkað.

VIT hava áður nevnt, at í nógvum størri, fjarløgdum dølum í Noreg, hava teir felagsfjós. Ofta er trot á fólki at ansa neytunum. Og nógv tíð fer til at røkja eina, tvær ella triggjar kýr. Við at hava neytini í felagsfjósinum kann henda tíðin verða nýtt til annað arbeiði, til uppdyrkingar og røkjan av jørðini, soleiðis at tíðarspellið við at hava neytini heima kann vera nýtt til frama fyri øktum neytahaldi.

Víðurskiftini hjá okkum eru meinlík teimum hjá dalabøndrunum í Noreg. Ein kúgv gevur almikið av arbeiði. Hon skal ansast og mjólkast hvønn dag. Afturat hesum kemur so arbeiðið við at útvega fóðrið: velting, sláing, hoygging og annað. Var kúgvin í einum felagsfjósi, var nógv tíð vunnin til annað arbeiði, t. d. at skapa líkindi fyri øktum neytahaldi, fyri at kunna halda eina kúgv aftrat.

Verður ikki hildið hesa leiðina hjá okkum, eru neyvan stórvegis líkindi fyri neytahaldi í støre mun; men tað er einki at ivast í, at hetta verður framtíðarleiðin. Aðrir hava roynt hetta við framúr góðum úrslitum. Vit verða at gera tað sama.

NEYTAHOTELLINI.

Sum longu nevnt eru teir byrjaðir við neytahotellum í Týsklandi. Hitt fyrsta er skipa í Rhindalinum og kann taka ímóti 1500 mjólkikúm.

Hetta er ikki beinleiðis tað sama sum eitt felagsfjós, ið tekur sær av neytaroktini árið runt. Neytahotell ið skal bara taka ímóti neytunum til ansingar, tá traðarmaðurin ella bóndin hava annað um hendur, t. d. tá teir skulu vára og heysta, ella eisini tá teir halda frí.

Neytini verða tá latin til neytahotellið saman við ti neyðugu fóðrinum. Á hotellinum taka tey sær so av sjálvari røktini: geva neytunum, mjólka teimum og lata mjólkina til søluhúsirnar.

Eigarmaðurin er fullkomuliga leysur við neytini. Hann skal bert gjalda eina ávísa peningahædd fyrt røktina og kann taka neytini heim aftur, tá tað hóskar honum best.

...gjøgt

MINSTALØNIN. 3. oktbr. 1962, slakan mánaða undan valinum skrívar »14. sept.«:

»Upp undir val siga allir flokkar seg vera so og so góðar við fiskimenn...

Tjóðveldisflokkurin er svorð og skjøldur fiskimannsins í stríðnum fyri bøtum korum ...

Tjóðveldisflokkurin kravdi undir seinastu tingsetu í MINSTA lagi 1200 kr. um mánaðin í minstulon...

... í mun til aðrar lønir er henda krevda løn eisini ov lítil...«.

VIÐM.:

Fiskimenn! Hava tit, sum sambært orð »14.sept« fáa so nógv ov lítla løn, fingið tykkara minstuløn hækkaða frá 1000 kr. upp í 1200 kr. ella meir, síðan tykkara formaður Erlendur Patursson kom í landsstýrið?

NEI — og aftur — NEI!

Men ein hevur fingið sína »minstuløn« hækkaða Erlendur Patursson!

Frá 24.000 kr. upp í 30.000 kr.

Hyggið fiskimannavinurin!

SVØRÐ OG SKJØLDUR FISKIMANNSINS!

Veitst tú

AT mætur maður hevur sagt: at um kongur verður so tættur í Føroyum, sum hann hevur verið seinastu árini, og fólkaflokkurin verður fyri skrællum av sama slag, sum árini frammanundan, verða flestu fólkaflokksmenn riddarar av Dannebrog og rimuligt fær flokkurin navnaðroyting til **HIN KONGILIGI FÓLKAFLOKKURIN**, (radikalir Dannebrogsmenn).

AT alt tað mikla málageipið frá tjóðveldismonnum, um at teir nú skulu seta figgjarlógina upp av nýggjum og greiðari, leggja landskassarokningarnar um og tílíkt, hevur nú ikki størri virði enn so, at alt hetta var lagt til rættis ella í umbúnað, áðrenn seinasta landsstýrið legði frá sær.

AT øll øsingarskrivingin í »14. september« og allar illgitingar móti seinasta landsstýri og Danum, um at hesir ikki vildu flyta fiskimarkið út 27. april í ár, nú dyggiliga eru falnar til jarðar, tí sjálvir hava teir brotið hvørt einasta lyfti í sambandi við útflytanina.

BARNA-MATUR

SANGIR. Vit havaher fyrstu reglurna á trimum sangum, men í staðin fyri hjáoðrini hava vit bert sett strikur. Hvørjir eru sangirnir:

—ú / a——a——a / —a—— / —i——

e— / —i——i—— / ú— /

—o——u— / —a—u—

—a— / ú— / —o——u——a—

i— / ——e——u—

—o—

ORÐ. Her skalt tú finna orð, ið svara til lýklaorðini aftansyri. Vit hava sett x, har hjáljóð skuldu standa og —, har sjálvljóð skulu standa:

x—xx—xx—x	= **fuglur**
x—x—xx—xx	= **djór**
—xx—x—x	= **í kirkjunni**
x—xx—x—	= **fuglur**
x—xx—x—	= **fuglur**
—xx——x	= **land**
x—xx—x	= **moli**

aðrir siga

Dimmalætt DAGUR NORÐLYS 14 SEPT

»FORMÁLIÐ« eftir oddagrein í Dimmalætting seinasta leygardag, har blaðið finnist at skriving 14. septembers um sjóverjuna, og tá serstakliga um nýggja verjuskipið »Vædderen«, sum »14. sept.« fillist á ikki enn skal hava tikið nakran trolara. Dimmalætting sigur m.a.:

»En virkelig effektiv beskyttelse af fiskegrænsen kan ikke måles efter, hvor mange ulovligt fisken de fremmede fiskefartøjer, der slæbes ind til forhør og dom i Thorshavn. Hjemmefiskere, som kun stræber efter arbejdsfred på egne enemærker, ønsker først og fremmest en polititjeneste på havet, som holder uvedkommende borte. For dem er det af mindre betydning, at så og så mange tyvfiskere slæbes ind til Thorshavn om ugen, end at tyv fiskere skræmmes fra at overskride fiskegrænsen.«

VERULEIKI

TAÐ ER VERULEIKI

AT Dagblaðið og fólkaflokksmenn iðuliga skuldsetti seinasta landsstýri, og tá serliga P. M. Dam og javnaðarmenn fyri ikki at vilja seta fiskimarkið út 27. apríl í ár.

AT 27. apríl í ár ráddu fólkaflokksmenn fyri borgum; men einki fiskimark varð útflutt henda dagin.

HESS-O-DAN



Danmarks bedste oliekamin. Automatisk rundtræk og trækregulering.

Pf. VALDEMAR LÜTZEN

Tórshavn